Súkkling

# Sponsoravtala millum Statoil og TSF

**Tórshavnar Súkklufelag hevur aftur í ár skrivað undir sponsoravtalu við Statoil, og inniber hetta, at Statoil 10. árið á rað er høvuðssponsor til árligu súkklukappingina Statoil kring Føroyar.**

Tíðindaskriv

Um bert tvær vikur fer árliga súkklukappingin Statoil kring Føroyar av bakkastokki, og er hetta 10. árið á rað at Statoil Føroyar er høvuðsstuðul til hesa stóru súkklukapping.

Statoil kring Føroyar kappingin er skipað soleiðis, at kappast verður í fimm dagar, á fimm ymiskum oyggjum kring landið, og eisini, at málið altíð er við eina Statoilstøð.

Kappingin í ár verður skipað eftir sama leisti sum í fjør, og tað vil siga, at koyrt verður akkurát somu rutur sum í fjør.

Kappingin byrjar mikudagin 20. juli. Tá verður koyrt á Borðoynni, hósdag á Eysturoynni, fríggjadag á Sandoynni, leygardag í Suðuroy, og sunnudagin, ið er seinasti kappingardagur, á Streymoynni.

- Vit eru sera glaðir fyri avtaluna. Samstarvið við Statoil hevur verið sera gott, og eisini hevur Statoil gjørt nógv burturúr á sjálvum máløkinum. Her hugsi eg um undirhald, tónleik o.a. Hetta er avgjørt við til at menna føroyska súkkling og sjálvandi eisini við til at kasta ljós á føroyska súkkling, sigur Gunnar Dahl-Olsen, formaður í Tórshavnar Súkklufelag.



*Gunnar Dahl-Olsen, formaður í Tórshavnar Súkklufelag og Steinfinn Mittelstein frá Statoil fegnast um nýggju sponsoravtaluna.*

# Marjun og Evald svumu skjótast um fjørðin

**Sunnudagin var Skálafjarðarsvimjingin á skránni, og tað vóru tveir svimjarar úr Havn, ið gjørdust fremstir.**

Svimjing

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Av tí at veðrið sunnudagin ikki var av tí besta, var rutan, ið svimjararnir skuldu svimja, broytt nakað. Veðrið var ikki til at svimja av Strondum yvir á Toftir, og ístaðin var svomið longri inni á Skálafjørðinum.

Lagt var til brots klokkan gott og væl tvey, og fyrsti svimjarin kom í landi í Saltnesi góðan hálvan tíma seinni.

Av teimum 18 luttakarunum, ið fóru undir svimjingina, vóru tað tríggir, ið góvust, áðrenn teir komu á mál. Tann eini av hesum trimum gavst enntá einans 20 metrar frá málinum.

Úrslitið av svimjingini var annars hetta:

**hjá kvinnum...**

| | |
|---|---|
| - nr 1: Marjun Eysturoy, Tórshavn | (0:31:53) |
| - nr 2: Nina Davidsen, Toftir | (0:44:34) |
| - nr 2: Nelly Poulsen, Toftir | (0:44:34) |
| - nr 4: Alisa Hentze, Toftir | (0:55:40) |
| - nr 5: Jenny Poulsen, Toftir | (1:00:36) |

**hjá monnum**

| | |
|---|---|
| - nr 1: Evald Rasmussen, Tórshavn | (0:13.13) |
| - nr 2: Jákup Johansen, Klaksvík | (0:13.45) |
| - nr 3: Gert í Hjøllum, Tórshavn | (0:16:22) |
| - nr 4: Ulrik í Hjøllum, Keypmannahavn | (0:17:08) |
| - nr 5: Ottar í Hjøllum, Toftir | (0:20:18) |
| - nr 6: Johan Joensen, Tórshavn | (0:28:01) |
| - nr 7: Jákup Andrias Hentze, Toftir | (0:29:13) |
| - nr 8: Jóhan F. Danielsen, Lamba | (0:35:13) |
| - nr 9: Janus Knudsen, Saltangará | (0:53:45) |
| - nr 10: Johnleif Gerðisá, Nes | (0:54:14) |

# Fyrsti FM-róður nakrantíð á Skála

Tíðindaskriv

Leygardagin 9. juli verður fyri fyrstu ferð skipað fyri FM-róðri á Skála. Hetta er í sambandi við, at Fjarðastevnan fyri fyrstu ferð verður hild-in í bygdini.

Fjarðastevnan skiftir annað hvørt ár millum Skálafjørðin og Vestmanna, og feløgini á Skála og á Strondum hava gjørt av at skiftast um at hava stevnuna aðru hvørja ferð. Strandingar høvdu stevnuna fyri tveimum árum síðan, nú stendur Skála so fyri tørni.

Kappróður er annars ikki nakað nýtt fyribrigdi á Skála. Í umleið 30 ár hevur Skála Ítróttarfelag skipað fyri bygdastevnu, har eisini kappróður hevur verið á skránni. Bygdastevnan hevur vanliga lig-ið seinasta vikuskiftið áðrenn Norðoyastevnu, og tí hevur hon fyri mong verið tann seinasta styrk-iroyndin áðrenn FM-róðrarnar.

Í ár verður so skipað fyri FM-róðri á fyrsta sinni. Fyri skálafólk er tað sjálvandi ein stórur dagur, tí kappróður er gomul ítrótt á Skála. Sambært hagtølunum hjá RSF hava skálabátarnir vunnið níggju meistaraheitir síðan 1973, men tað sigur ikki alla søguna. Áðrenn tað høvdu skálamenn vunn-ið hópin av róðrum í egnum og í læntum báti.

Nógv verður gjørt burtur úr fyri at fáa róðurin at ganga sum hann skal. Til Varmakelduróðurin gav Vónin í Fuglafirði RSF ein nýggjan sterkari fastan start, og hann verður eisini brúktir á Skála, har ætlanin annars er at hava tveir fastar startir. Inn-arasíðan av róðrarøkinum verður uppmerkt við boyum fyri hvørjar 200 metrar, og eisini verða ljós sett upp innan fyri málið at stýra eftir hjá róðursmonnunum. Og fyri at avgreiðslan av FM-róðri-num skal ganga so skjótt sum tilber, verður barnaróðurin settur í gongd kl. 13.30.

Umstøðurnar at rógva á Skálafjørðinum eru sera góðar, og í so máta er Skála einki undantak. Kort-ini vilja fyrireikararnir tryggja sær, at hesin fyrsti FM-róðurin gongur so væl sum yvirhøvur tilber, og tí vilja teir gera alt fyri at so verður.

Málið verður á Stórhúskajini, har útsýni til róðrarøkið og málið er serstakliga gott. Hetta er umleið 200 metrar innan fyri Byggihøllina, har bátarnir annars verða flotaðir. Her fara fyrireikarnir at hugna um, so áskoðarar og róðrarfólk fáa ein góðan dag. M. a. vera borð og stólar sett upp á máløkinum, skipað verður eisini fyri matsølu og eisini vera tivoli og hoppiborgir á kaj-økinum.

Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag, sum standa fyri hesum fyrsta FM-róðrinum á Skála, vóna, at undirtøkan verður góð, og at nógvir áskoðarar leggja leiðina inn á Skála seinnapartin leyg-ardagin.

**Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag**